**SKEMMAN** | søkir handilslærling



## Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

**Vit bjóða:**
· Møguleika fyri altjóða útbúgving
· Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
· Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
· Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709

**SKEMMAN**

petur & petur • 320870

## Føroya Stuttligasta Borðhald

- Ókeypis at ferðast gjøgnum vágatunnilin
- Frásøgumaður: Hans Hjalti Skaale
- Skemtarar úr øllum Føroyum
- Café tónleikur við Martin Joensen Band
- Góður Countrydansur




**02. Septembur í høllini á Giljanesi**

Stuðlað av FØROYAR – so ert tú tryggari · kall · formula.fo



*– Tað var eg, sum kom við hugskotinum um Faroejet. Felagið datt gott nokk niðurfyri, men navnið bleiv so veruleiki, sigur Jesper Rungholm, stjóri í danska flogfelagnum DAT. Hann heldur, at Faroejet hevur gjørt nakrar grundleggjandi villur í síni marknaðarføring*

DAT-stjórin:

# »Faroejet« var mítt hugskot

**– Faroejet hevur gjørt fleiri grundleggjandi villur, heldur Jesper Rungholm, stjóri í danska flogfelagnum DAT, sum gjørdi nakrar túrar á Føroyaleiðini fyri einum góðum ári síðani. Stjórin upplýsir, at felagið tá hevði ítøkiligar ætlanir um at stovna eitt føroyskt flogfelag saman við føroyskum íleggjarum. Men ætlanin datt niðurfyri**

FLOGFERÐSLA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Fyrra vár vóru ítøkiligar ætlanir um at stovna eitt nýtt føroyskt flogfelag. Danska flogfelagið Danish Air Transport, stytt DAT, var millum stigtakararnar. Felagið hevði gjørt nakrar royndartúrar á jólum 2004 fyri at kanna møguleikarnar at flúgva á Føroyaleiðini, og niðurstøðan var, at tað kundi lata seg gera, um rætt varð borið at.

– Vit skuldu hava flogfar, sum var egnað til Føroyaleiðini. Harafturat ynsktu vit, at flogfarið ikki einans skuldi flúgva millum Føroyar og Danmark, sigur stjórin í DAT, Jesper Rungholm.

Danska flogfelagið hevði realistiskar samráðingar við fleiri føroyskar íleggjarar, og tað kom enntá so langt, at tey fingu grønt ljós frá myndugleikunum um at flúgva. Men samráðingarnar duttu niðurfyri av ymsum orsøkum. Millum annað kom Fønix-gølan, sum gjørdi, at føroysku íleggjararnir fingu kaldar føtur.

– Fleiri av íleggjarunum mistu nógvan pening, tá íleggjarafelagið Fønix fór á heysin, og so datt alt niðurfyri, sigur stjórin í DAT, sum ikki vil upplýsa, hvørjir hesir føroysku íleggjararnir vóru.

### Faroejet gjørt grundleggjandi villur

Flogfelagið, sum ongantíð bleiv til nakað, fekk fleiri navnauppskot. Ta eina uppskotið kom frá DAT-stjóranum. Navnið var Faroejet.

– Tað var eg, sum kom við hugskotinum um at kalla felagið fyri Faroejet. Felagið datt gott nokk niðurfyri, men navnið bleiv so veruleiki, heldur Jesper Rungholm skemtiliga fyri.

Hann hevur ongantíð ivast í, at marknaður er fyri tveimum feløgum á Føroyaleiðini. Men skuldi eitt nýtt felag taka kappingina upp við Atlantic Airways, so var sera týdningarmikið at bera seg rætt at.

– Eg kundi nevnt ein lista við tíggju punktum yvir, hvussu man skal bera seg at. Faroejet gloymdi tvey tey týdningarmestu punktini, vísir stjórin á.

Fyrsta punktið er at selja ferðaseðlar í góðari tíð. Helst eitt hálvt ár áðrenn. So var ikki hjá Faroejet. Næsta punktið er at gera fastar loyalitetsavtalur við føroyska vinnulívið og møguliga tað almenna.

– Fólk gloyma skjótt. Kann vera, at fólk eru sera takksom fyri, at eitt nýtt flogfelag brýtur monopolstøðuna og gevur bíligari ferðaseðlar. Men tað er ikki meir enn ein spurningur um tíð, áðrenn hitt flogfelagið eisini lækkar sínar prísir og sostatt heldur fast við síni viðskiftafólk, heldur Jesper Rungholm.

### DAT givið upp í Føroyum

Jesper Rungholm samanber støðuna við Bornholmleiðina. Kimber Air hevði monopol, og prísurin var høgur. Fyri einum ári síðani tók DAT kappingina upp við dupult so lágum prísum. Kimber Air lækkaði sínar prísir næstan samsvarandi og helt sostatt fast í síni sterku støðu sum ráðandi á leiðini.

– Fólk vóru takksom fyri, at vit komu inn og fingu lækkað prísirnar, men meirilutin flýgur framvegis við Kimber Air, vísir Jesper Rungholm á.

Jesper Rungholm væntar ikki, at DAT fer at gera seg galdandi á Føroyaleiðini aftur.

– Tíðin er gingin undan. Vit høvdu eitt skot í byrsuni, og tað hava vit brúkt, sigur Jesper Rungholm at enda.